LM-099/2020

Fylgiskjal 9.

Vestmanna Kommuna
Bakkavegur 8 · Postboks 91 · FO-355 Vestmanna

Tlf. 770 100 · Fax 770 101
vestmanna@vestmanna.fo
www.vestmanna.fo

Fiskimálaráðið
fisk@fisk.fo

Vestmanna, 5. januar 2021
J.nr.: 1400002-9-2020
Viðgjørt: PTP/MP

Hoyringssvar - uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um tilbúgving

Vestmanna Kommuna hevur fingið uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um tilbúgving til hoyringar.

Uppskotið hevur verið viðgjørt á fundum hjá Vestmanna Sløkki- og bjargingarliði og av Tilbúgvingarnevndini fyri Vestmanna.

Tilbúgvingarnevndin sær helst, at Vestmanna Sløkkilið verður fyri seg sjálvt, tí mett verður, at liðið er sera væl útbygt og at liðið er væl skipað.
Men tó, um verandi lógaruppskot verður samtykt, tekur tilbúgvingarnevndin undir við, at Tilbúgvingarøkið Norðstreymoy verður umfatað av Vestmanna kommunu og Kvívíkar kommunu.

Í tilbúgvingarhøpi liggur økið (Vestmanna/Kvívík) nakað burtur frá meginøkinum, og tað er av alstórum týdningi, at vit her hava eitt vælvirkandi sløkkilið, og tað er tí sera umráðandi, at økið í Norðstreymoy verður eitt økið fyri seg, heldur enn at vera lagt saman við møguligt annað tilbúgvingarøki.

Í Vestmanna er vinnuvirksemi við vandamiklum evnum (VestPack hevur m.a. stórar goymslur av klori og meyrusýru, og á Fiskavirkinum hevur ammoniak. Bygdin hevur stóran fólkaskúla, Miðnámsskúla, ellisheim, fleiri skip. Um summarið eru sera nógv ferðafólk í økinum.
Um veturin kemur tað meira enn so fyri, at bygdirnar eru avskornar orsaka av kava á landsvegnum. Tá er umráðandi, at løgregla/sjúkrahús kann heita á sløkkiliðini í Vestmanna og í Kvívík um hjálp, áðrenn hesi kunnu koma á staðið.

Samanumtikið verður tikið undir við lógaruppskotinum, og at Tilbúgvingarøkið Norðstreymoy verður umfatað av Vestmanna kommunu og Kvívíkar kommunu.

Vinarliga

Vestmanna Kommuna

Pauli T. Petersen
borgarstjóri